# Viðtøkur fyri Ramsar nevndina fyri Nólsoy

**Endamálið við Ramsar nevndini er at gera Ramsar ætlan fyri Nólsoy, sum m.a. skal vísa á møgulig tiltøk, átøk og mannagongdir, sum skulu til, fyri at tryggja, at náttúruvirði í Nólsoy, serliga fuglur og vistskipan teirra, verða varðveitt eftir princippinum um skynsama nýtslu (wise-use).**

Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við allar áhugapartar, við serligum denti á borgarar, felagsskapir o.o. í Nólsoy.

**Ramsar nevndin í Nólsoy hevur hesar føstu limir:**

- Umhvørvisstovan,
- Søvn landsins/Náttúrugripasavnið,
- Tórshavnar kommuna,
- Ramsar umboðið hjá Tórshavnar kommunu í Nólsoy,
- Umboð fyri hagastýrini í Nólsoy,
- Kunningarstovan í Nólsoy.

Aðrir áhugapartar verða bodnir til fundar eftir tørvi. Nevndin skipar fyri almennum fundum tá tørvur er á tí.

Fiskimálaráðið og Mentamálaráðið fylgja arbeiðinum, og fáa avrit av fundarfrásøgnum.

**Ítøkilig mál**

1) At eyðmerkja møguligar hóttanir ímóti fuglalívi o.ø., og vísa á verjutiltøk, sum skulu setast í verk. Serligur dentur verður lagdur á at verja og tryggja drunnhvítan og lundan.
2) At gera "Ramsar ætlan fyri Nólsoy" (fyrisitingarætlan/Management Plan), sum ætlandi skal verða liðug í 2014.
3) At viðgera spurningar viðkomandi fyri yvirvøku av Nólsoy sum Ramsar øki.

**Mannagongdir**

- Nevndin fer at hittast javnan í sambandi við, at Ramsar ætlanin fyri Nólsoy verður gjørd, á leið 1-2 ferð um mánaðin árið 2014 út.
- Fram til, at Ramsar ætlanin er liðug, leiðir Umhvørvisstovan arbeiðið og virkar sum formaður og skrivari í nevndini.
- Á leið eina viku áðrenn hvønn fund sendir Umhvørvisstovan limunum uppskot til fundarskrá og í seinasta lagi 3 dagar áðrenn fundin fáa limir møgulig fundarskjøl.
- Uppskot til fundarfrásøgn verður send limunum 1-2 vikur eftir fundin.
- Nevndarlimir, sum ikki eru í almennum starvi, fáa fundarsamsyning og endurgoldið ferðaútreiðslur sambært almennum reglum.

Viðtøkurnar vórðu samtykt á fundi í Ramsar nevndini fyri Nólsoy tann 14.05.14.